LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Runavíkar Kommuna
Postbox 139
Heiðavegur 26
610 Saltangará

Tórshavn, tann 5. september 2023
J.Nr.: LUM-16- 23/13716-23
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Skriv um viðgerðina hjá Runavíkar kommunu av einari umbøn um innlit**

Tann 25. juni 2023 fekk eg eina klagu frá A um, at Runavíkar kommuna ikki svaraði eini umbøn um innlit í trý ávís mál, eitt fútaforboð, skjøl og fundarfrágreiðingar í sambandi við hesi mál.

Sambært málsskjølunum sendi klagarin innlitsumbøn til Runavíkar kommunu tann 20. mai 2023.

Tann 22. mai 2023 sendi Runavíkar kommuna klagaranum móttøkuváttan og kunnaði um, at málið var skrásett og latið víðari til avgreiðslu.

Tann 7. juni 2023 sendi klagarin áminning til kommununa um innlitsumbønina.

Tann 19. juni 2023 sendi klagarin tvær áminningar til kommununa um málið.

Tá klagarin framvegis ikki frætti frá kommununi, sendi hann tann 25. juni 2023 klagu til mín um vantandi svar frá Runavíkar kommunu og handfaringina av málinum. Klagarin vísti á, at hann hevði brúk fyri at fáa umbidnu skjølini, so hann kundi gera viðmerkingar til eina kæru um eitt byggimál.

Tann 28. juni 2023 sendi eg klaguna til Runavíkar kommunu við áheitan um at lata mær frágreiðing um málið og skjølini í málinum. Freistin varð sett til 3 vikur. Sama dag fekk eg móttøkuváttan frá kommununi.

Tann 8. juli 2023 sendi klagarin mær avrit av svari, sum hann hevði fingið 7. juli 2023 frá Runavíkar kommunu uppá innlitsumbønina.

Tá freistin hjá Runavíkar kommunu at svara mær var farin, og eg ikki hevði frætt frá Runavíkar kommunu, sendi eg tann 16. august 2023 áminning til kommununa um at lata mær umbidnu frágreiðing og skjøl um málið.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Tann 18. august 2023 svaraði Runavíkar kommuna:

> ” ... hevur 7. juli fingið innlit í øll skjøl, sum hann hevur biðið um, men tíverri ikki til tíðina – Skjølini eru viðheft hesum telduposti. Einasta orsøk til at málið ikki er svarað, er at umsitingin ikki hevur havt stundir til at avgreiða hetta áðrenn summarferiuna - hetta áttu vit sjálvandi at havt fráboðað, men tað er tíverri ikki gjørt.“

Av málsskjølunum sæst ikki, um Runavíkar kommuna hevur viðgjørt innlitsumbønina sum partsinnlit ella sum alment innlit. Hetta hevur tó ikki nakran týdning í mun til viðgerðina í hesum máli. Hetta tí bæði í § 16, stk. 2 í innlitslógini og fyrisitingarlógini er ásett, at er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Sambært § 16, stk. 2, hevur myndugleikin sostatt eina fráboðanarskyldu. Ásetingin hevur eisini sum fyritreyt, at myndugleikin beinanvegin snarkannar eina umbøn um innlit, soleiðis at myndugleikin skjótast gjørligt er førur fyri at gera sær eina meting av, hvussu málsviðgerðin skal handfarast, og hvussu drúgv málsviðgerartíðin kann væntast at verða.

Fráboðanarskyldan sambært § 16, stk. 2 í innlitslógini og fyrisitingarlógini er treytaleys. Tískil skal ein myndugleiki leggja síni viðurskifti soleiðis til rættis, at hann er førur fyri at geva eina rættstundis fráboðan um tey viðurskifti, ið gera at málsviðgerðin av einari innlitsumbøn verður seinkað.

Soleiðis sum málið er lýst, kann eg staðfesta, at tað gekk ein 1 mánaður og 17 dagar frá tí, at klagarin tann 20. mai søkti um alment innlit, og til Runavíkar kommuna tann 7. juli svaraði innlitsumbønini, og at klagarin ikki fekk nakra fráboðan samsvarandi reglunum í § 16, stk. 2 í innlitslógini. Ei heldur svaraði kommunan teimum áminningum, ið klagarin sendi. Harafturat svaraði kommunan heldur ikki mínari umbøn um frágreiðing og skjøl rættstundis, men mátti eg senda kommununi eina áminning, áðrenn eg fekk svar sum umbiðið. Hetta er als ikki nøktandi.

Eg haldi eisini, at frágreiðingin hjá Runavíkar kommunu um, at umsitingin ikki hevði stundir til at avgreiða málið áðrenn summarferiuna, og at tey tíverri ikki høvdu sent klagaranum fráboðan um hetta, ber brá av, at viðgerðin av innlitsmálum ikki er nóg væl skipað.

Samanumtikið fari eg tí at geva Runavíkar kommunu eina átalu fyri handfaringina av hesum máli.

Avrit av hesum skrivi er sent klagaranum til kunningar og verður í næstum almannakunngjørt á heimasíðu okkara www.lum.fo í navnleysum líki.

Vinarliga

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður